# Viðgerð fyri bróstkrabba skal veitast í Føroyum

**Tað er av stórum týdningi, at viðgerðirnar kunnu gerast í Føroyum, so vit eisini kunnu menna og styrkja tað heilsufakliga umhvørvið í føroyska heilsuverkinum, segði Hans Pauli Strøm, tá hann svaraði fyrispurningi frá Annitu á Fríðksmørk**

HEILSUPOLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Á løgtingsfundi tann 22. mars svaraði Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, fyrispurningi frá Annitu á Fríðriksmørk, løgtingskvinnu, um landsstýrismaðurin fer at tryggja, at nýggja slagið av skurðviðgerð, sum varð umrøddur í fjølmiðlunum herfyri, fer at verða gjørt í Føroyum.

Hetta snýr seg um eitt nýtt slag av skurviðgerð fyri bróstkrabba, sum sparir sjúklingin fyri óneyðugan skurð undir arminum. Við nýggja viðgerðarháttinum ber til at staðfesta undir sjálvari skurviðgerðini, um krabbameinið hevur breitt seg til eitlarnar, og er tað ikki tilfeldið, verða eitlarnir ikki tiknir.

– Til henda fyrra spurningin er svar mítt, at sum landsstýrismaðurin í heilsumálum ætli eg mær at tryggja, at nýggi skurðviðgerðarhátturin fyri bróstkrabba (ið verður kallaður »sential node«) verður settur í verk í Føroyum. Enn hevur bert ein royndar- ella »pilotskurðviðgerð« verið framd á Landssjúkrahúsinum, og tí skal meira fyrireiking til, áðrenn talan kann gerast um eina regluliga viðgerð í føroyska sjúkrahúsverkinum, sigur Hans Pauli Strøm.

Annita á Fríðriksmørk vildi eisini hava landsstýrismannin at vita, um tað er rætt, at kostnaðurin fyri tólið, sum skal brúkast til viðgerðina, fór at kosta einar 200 túsund krónur. Harumframt kemur so viðgerðin, hvørs førleika vit hava á landssjúkrahúsinum. Men spurningurin er, um tað loysir seg at senda sjúklingarnar av landinum av fíggjarligum orsøkum, tí er spurningurin: Hvat kostar



*– Sum landsstýrismaðurin í heilsumálum ætli eg mær at tryggja, at nýggi skurðviðgerðarhátturin fyri bróstkrabba verður settur í verk í Føroyum, sigur Hans Pauli Strøm*

sama viðgerð umframt kost og logi, um valt verður at senda somu kvinnur til Danmarkar fyri at fáa viðgerðina framda?

– Til henda seinna spurningin er svarið: Talið av kvinnum, sum eiga at fáa boðið hesa skurðviðgerðina, og sum higartil hava verið sendar til Danmarkar, er einar 10-12 árliga.

– Kostnaðurin fyri hesar skurðviðgerðir í Danmark er tengdur at, hvussu umfatandi skurðviðgerðin verður, og liggur ímillum 25.000–41.000 kr. fyri hvørja skurðviðgerð. Og haraftrat kemur kostnaður fyri ferðing og uppihald, umframt møguligan fylgjara, sigur landsstýrismaðurin.

– Eg havi fingið at vita frá Landssjúkrahúsinum, at kostnaðurin her verður mettur at gerast áleið tann sami sum fyri viðgerðina í Danmark. Men tá skal so ikki roknast útreiðslur til ferðing og uppihald. Harumframt kemur íløgukostnaðurin upp á umleið 200.000 kr. til ein sokallaðan »gamma-scannara«. Ringt er tó heilt greitt at gera upp, hvat faktiski kostnaðurin verður, við tað at hetta virksemið verður lagt oman á verandi rakstur á Landssjúkrahúsinum. Ein partur av kostnaðinum fer at liggja í at styrkja patologi-tænastuna á Landssjúkrahúsinum, m. a. við at fáa tað telepatologiska sambandið við Ríkissjúkrahúsið virkið.

Í løtuni kannar Almanna- og heilsumálaráðið meira nágreiniliga tey fíggjarligu og praktisku viðurskiftini í sambandi við at taka hesa viðgerðina heim.

Hans Pauli Strøm upplýsir, at undir orðaskiftinum varð eisini spurt, hvussu vit kunnu tryggja, at kvinnurnar fáa eina rætta viðgerð, nú tað hevur verið so nógv at hoyrt um kvinnur á ávísum plássum í Danmark, sum hava fingið skeiva viðgerð. Til hetta er at siga, at tað er júst fyri at tryggja tað røttu og bestu viðgerðina, at henda royndar- ella pilotviðgerðin hevur verið gjørd í Føroyum. Út frá hesum verður gjørd ein heilsufaklig eftirmeting av hesi royndini, og ein ætlan fyri, hvussu farast skal fram, um viðgerðin skal setast í verk í Føroyum. Landssjúkrahúsið ger so eina tilráðing til landsstýrismannin og Almanna- og heilsumálaráðið, hesum viðvíkjandi.

Eisini varð undir orðaskiftinum víst á, at tað er fyrst og fremst av atliti til sjúklingin, at tað er so neyðugt, at henda viðgerðin kann fara fram í Føroyum, tí ein sjúklingur í hesi støðu hevur serliga stóran tørv fyri at kunna kenna seg í tryggum og heimligum umhvørvi.

– Haraftrat er tað av stórum týdningi, at viðgerðirnar kunnu gerast í Føroyum, so vit eisini kunnu menna og styrkja tað heilsufakliga umhvørvið í føroyska heilsuverkinum, sigur Hans Pauli Strøm.

Hvussu man gangast í Japan?



[2]

Nógv gjørdust ov sein, tá Føroya Banki fyrr í ár beyð viðskiftafólkum at gera íløgur fyri 100 milliónir krónur í lánsbræv við trygd ímóti at missa íløgda peningin. Men nú kunnu íleggjarar aftur halda seg framat í Føroya Banka.

Frá 20. mars til 7. apríl 2006 ber til at gera íløgur í nýtt lánsbræv, sum fylgir gongdini á japanska partabrævamarknaðinum. Íleggjarar fáa við vissu 1% í rentu um árið. Í mesta lagi kann rentan gerast heili 30% árliga í fimm ára gildistíðini.

Kommuninvest í Svøríki útgevur nýggja lánsbrævið, og Føroya Banki samstarvar við Nordea um útgávuna. Teknast kunnu 200 milliónir krónur hesaferð.

Vilt tú vita meira um nýggja lánsbrævið, set teg so í samband við íløguráðgevarar bankans.



FØROYA BANKI

TEAM85